# Byrsumaður hótti børn á vegnum

**Ein maður gekk við byrsu millum húsini í Miðvági og hótti børn, sum komu framvið. Løgreglan tók mannin, men hann varð ikki fongslaður**



*Ein maður gekk við byrsu og hótti fólk í Miðvági mánakvøldið*
*Eftirgjørd Mynd*

HÓTTAN
*Edvard Joensen*

**Miðvági:** Nøkur børn, sum mánakvøldið vóru á veg til venjing við barnakórinum í Miðvági, vórðu hótt av byrsumanni á vegnum. Løgreglan tók mannin, men mátti lata hann leysan aftur.

Regin Jespersen, sýslumaður í Vágum, sigur, at løgreglan fekk fráboðan um hendingina mánakvøldið og fór eftir manninum.

Tá løgreglan fann mannin, var hann í einum bili, har bilførarin hevði fingið tosað hann til rættis og sissað hann. Maðurin varð beinanveg tikin.

Sýslumaðurin sigur, at talan var um ein mann, sum gekk á vegnum í Miðvági við eini duplett, sum hann peikaði eftir fólki við. Hann hótti børn, sum gingu á vegnum, við at skjóta tey.

Tá løgreglan fann mannin, var byrsan ikki lødd, sigur sýslumaðurin, og løgreglan veit heldur ikki, um hon hevur verið tað yvirhøvur.

– Men slíka hóttan meta vit sera álvarsliga kortini og í øllum førum so grova, at vit vildu hava manning fyri rættin og varðhaldsfongslaðan beinanveg, sigur Regin Jespersen, sýslumaður.

Men tað vildu løgfrøðingarnir hjá ákærumyndugleikanum ikki, sigur hann. Teir mettu ikki, at grundarlag var fyri varðhaldsfongsling, tí byrsan var ikki lødd, tá maðurin varð tikin.

Kortini sleppur maðurin ikki undan ákæru, hóast hann enn gongur leysur, væntar sýslumaðurin. Tí slíkt er so mikið groft lógarbrot, at sak verður reist.

Heldur ikki er tað fyrstu ferð, maðurin er í holt við løgregluna, sigur Regin Jespersen. Hann er gamal kenningur, sum teir plaga at siga í slíkum føri.

– Ein aldeilis góður kenningur hjá okkum, leggur hann afturat.

# Vevurin er settur í handilin



*Dóttir Katrina avgreiðir fyrsta kundan í nýggja handlinum, Stikkan, sum lat upp á Eiði týsdagin*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Á Eiði lat nýggjur handil við klæðnavørum og brúkslist upp týsdagin. Eigarin fer eisini at hava klædnaframleiðslu handlinum**

HANDILSVINNA
*Edvard Joensen*

**Eiði:** Brúkslutir, sum gjørdir eru úr føroyskum tilfari, verða seld í nýggjum handli á Eiði saman við eitt nú innfluttum tógvi.

Uppi í Kolli á Eiði, oman fyri hotellið, lat nýggjur handil upp týsdagin. Tað er Katrin Haraldsen, sum hevur latið upp ein bæði vanligan og heldur øðrvísi handil.

Talan er nevniliga um handil, har samstundis verður framleiðsla av klæðnavørum. Har eru bæði vevur og seymimaskina, og við tey fer Katrin sjálv at sita og gera klæðnapløgg, sum seljast skulu í handlinum.

Navnið er Stikkan, og tað vísir aftur til, at her verða meturvørur seldar. Tað verða tær eisini, um enn ikki so dominerandi, at ein leggur merki til tað, beinanveg ein kemur inn. Men hevur tú hug at keypa tær klæði at seyma einar føroyska mannfólkabuksur, verður rullað og mált, til tú hevur fingið tað, brúk er fyri.

Men í stóran mun eru tað enn vørur frá øðrum føroyskum framleiðarum, ein leggur merki til í nýggja handlinum á Eiði. Fyrst og fremst ullarvørur, og fýra eru fyritøkurnar, sum Stikkan selur fyri. Her eru troyggjur og húgvur. Skógvar og taskur, umframt annað, sum Tøting og Snældan, Pau og Suðuroyar Ullarvirki hava gjørt.

Mein eisini leirílut eru at síggja í handlinum. Tey eru slík, sum Guðrið Poulsen í Havn hevur gjørt.

At Handilin Stikkan er vorðin til í hesum líki, er ikki av tilvild, greiðir Katrin Haraldsen frá. Talan er um eina fleiri ára gamla ætlan, sum kortini er eitt sindur broytt.

Sjálv hevur hon útbúgving á økinum, og sum endaliga uppgávu í samband við útbúgvingina menti hon hetta hugskotið at hava ein handil við framleiðslu samstundis.

– Í grundini hugsaði eg um mótaklæði í meira traditionellum stíli, men eri so komin eftir, at hetta við haldgóðum, føroyskum klædnavørum er meira hóskandi.

Fyrsti kundin í handlinum kemur fram at diskinum og vil gjalda fyri okkurt, keypt verður. Tað er ein fitt smágenta, og innan fyri diskin stendur ein onnur á leið javngomul genta og avgreiðir hana, meðan Katrin sjálv stendur og fylgir við og vegleiðir.

– Eg havi gjørt av, at dóttirin skal avgreiða fyrsta kundan, sigur hon. Tí ætlanin er, at hetta skal halda fram. Og eg síggi nakað symbolskt í, at hon verður tann fyrsta, sum avgreiðir ein kunda, sigur hon.



*Katrin Haraldsen hevur sett vevin upp í handlinum og fer sjálv at virka pløgg at selja*
*Mynd: Edvard Joensen*

# Nýggjur barnagarður í Hvalvík



*Børnini hava góðar umstøður í spildurnýggja barnagarðinum í Hvalvík*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Í Hvalvík varð nýggjur barnagarður latin upp í seinastu viku. Barnagarðurin liggur í sera barnavinaligum umhvørvi og er smíðaður til endamálið**



*Nýggi barnagarðurin liggur sera væl fyri oman móti ánni framman fyri skúlan í Hvalvík*
*Mynd: Edvard Joensen*

ANSING
*Edvard Joensen*

**Hvalvík:** – Hann er spildurnýggjur og sera væl innrættaður. Gjørdur beinleiðis til endamálið, og tað tykist rokkið, sigur leiðarin á nýggja dagstovninum í Hvalvík.

Beint framman fyri skúlan í Hvalvík standa eini spildurnýggj hús, sum líkjast einum ovurstórum sethúsum. Stórt skelti frá Norðsetri er á skjøldrinum. Hetta er barnagaðrurin, sum varð tikin í brúk í seinastu viku.

Staðið er væl valt. Burtur frá høvuðsvegnum, sum fer um Streymnesoyruna. Frammi í Dalinum oman móti ánni.

– Tað verður nakað av ferðslu niðan til Saksunar um summarið, siga tey á barnagarðinum, men tí kunnu vit væl liva við. Fara vit fram í Dalin, kunnu vit ganga fram við ánni.

Og júst ánna vænta tey at fara at brúka í stóran mun, har hon fer sjóðandi beint undir vindeyganum.

Umframt er økið rundan um sjálvan bygningin asfalterað, so lætt er at seta eitt nú eitt uttandura spælipláss upp.

Irena Olsen, leiðari í barnagarðinum, sigur, at tey í løtuni hava 33 barnagarðsbørn. Umframt eru so sjey skúlabørn, sum koma í barnagarðin eftir skúlatíð. Men til várs aftur koma 12 vøggustovubørn afturat. Tey fara at halda til í niðaru hæddini, sum enn ikki er liðugt innrættað.

Hvalvíkar Kommuna hevur havt kommunala dagrøkt, sum nú verður niðurløgd, tá stovnurin er fult útbygdur. Tær, sum hava passað børn í barnagarðsaldri, eru givnar, og summar hava fingið starv í barnagarðinum.

Hvalvíkar Kommuna er í menning sæst á byggingini, sum er báðu megin ánna. Og fólk hava áhua at flyta til, veit barnagarðsleiðarin at siga.

Irena Olsen greiðir frá, at kommunan hevur lagt upplýsingar um barnagarðin út á heimasíðu sína, og tað hevur fingið fólk at vísa áhuga. Dømi eru um fólk, sum eftir at hava sæð heimasíðuna, hava spurt seg fyri um grundstykki, tí tey hava møguleika fyri barnaansing, sigur hon.

Nýggi barnagarðurin er teknaður hjá teknistovuni West Tech í Sørvági, og Norðsetur í Hvalvík hevur smíðað. Sum stovnurin stendur í dag, kostar hann knappa hálvafjórðu millión. Tá alt er liðugt, fer hann væntandi at standa í umleið 4,4 miliónum krónur.



Dávid R. Hansen:

# Kunnu einki gera við meirkostnað

**Stjórin í Vágatunnilinum sigur, at felagið verður noytt til at rætta seg eftir teimum krøvum, ið verða ásett í sambandi við tunnilsgerð sum hesa. Øktu krøvini eru fremsta orsøkin til, at tunnilin er vorðin so nógv dýrari enn ætlað**



*Dávid R. Hansen sigur, at einki kann gerast við meirkostnaðin fyri Vágatunnilin.*
*Mynd: Jens Kristian Vang.*

VÁGATUNNILIN
*Heri á Rógvi*

Leiðslan og nevndin í P/F Vágatunnilinum situr enn og roknar út, hvussu nógv skal skerjast av kostnaðinum fyri at ferðast undir Vestmannasundi.

Nýggju útrokningarnar vórðu neyðugar, tá søgan um vágatunnilin fekk enn ein kapittul, tá nýggj tøl frá Strandferðsluni komu til yvirflatuna, ið vísti eitt munandi øðrvísi ferðamynstur enn tað, ið Vágatunnilin hevði roknað við.

Dávid Reinert Hansen, stjóri fyri P/F Vágatunnilin, sigur, at teir í løtuni arbeiða internt við at áseta nýggjar prísir. Tað hevur verið frammi, at prísirnir skulu lækkað við tjúgu prosentum, men Dávid R. Hansen vil ikki siga nakað, hvussu stór lækking talan verður um.

Hann sigur tó, at Vágatunnilin hyggur longur enn bert eitt ár aftur í tíðina.

—Vit skulu reka tunnilin í fimtan ár, og tí skulu vit eisini áseta prísir, sum skulu miðja eftir at kunna galda í fimtan ár. Hetta gera vit best við at hyggja fimtan ár aftur í tíðina, sigur Dávid Reinert Hansen.

Stjórin metir, at á henda hátt vil tann mest rættvísa myndin vísa seg.

### Óheppið

Spurdur, hvørt hann ikki helt hetta vera løgið, nú nýggj tøl knapliga koma fyri dagin vikur eftir, at Vágatunnilin hevur almannakunngjørt prísir, ið sagdar vera at vera grundaðir á tøl frá Strandferðsluni.

—Eg undrist eisini. Hetta er sera óheppið. Vit høvdu vent okkum til Strandferðsluna og fingið tøl, men so koma hesi tølini, og tað undrar meg, sigur Dávid R. Hansen.

Hann vísir aftur, at hetta var planlagt frá byrjan fyri at røkka einum kompromis.

Hann metir ikki, at nakar illvilji er millum Strandferðsluna og Vágatunnilin, men hann bert staðfesta, at teir ikki meta seg hava gjørt nakað skeivt í sambandi við at fáa til vega hagtøl.

### Dýrari

Kostnaðurin fyri Vágatunnilin er vorðin væl dýrari, enn áður ætlað. P/F Vágatunnilin metti kostnaðin til 240 mió. upprunaliga, men endaligi kostnaðurin fer at liggja millum 275 mió. og 280 mió.

Orsøkin til meirkostnaðin er príshækkingar, umsiting og serliga tað, at krøvini í sambandi við trygd og annað eru broytt.

Vágatunnilin nýtir norskan normal, og hesi krøv mugu teir hjá Vágatunnilinum rætta seg eftir.

—Tað er ikki nakað at gera við hetta. Vit mugu bara rætta okkum eftir hesum, sigur Dávid Reinert Hansen.

Í síðstu viku skrivaðu vit um, at landið longu hevði nýtt hópin av pengum upp á Vágatunnilinum og við lántøkuni hjá P/F Vágatunnilinum, so er higartil goldið væl meira enn ein tunnil kostar.

Í hesum sambandi spurdu vit eisini Henning Jacobsen, fyrrverandi Landsverkfrøðing, um ein viðmerking. Hann nevndi, at teir í 1988 upprunaliga planlagdu at gera tunnilin fyri 230 mió alt íroknað.

Í árunum 87-89 vórður 45 milliónir játtaðar á fíggjarlógini, og hesir pengar vórðu eisini nýttir til at seta hol á arbeiðið.

Henning Jacobsen metir, at størsti munurin er á hesari verkætlanini og teirri upprunaligu sjálvandi er tíðin, men hann nevnir eisini, at teir vildu havt væl minni umsiting, nýtt fleiri føroyskar arbeiðarar og teir høvdu eisini nýtt longri tíð.

Dávid R. Hansen sigur, at verkætlanin í dag er munandi øðrvísi , enn hon, ið Landsverkfrøðingurin planlegði í sínari tíð.

—Tað er fyrst nýggjar tíðir. Hetta merkir eisini, at krøvini eru heilt øðrvísi, og hetta ger ætlanina munandi dýrari, sigur Dávid R. Hansen.

Av teimum upprunaligu 45 mió. hevur Vágatunnilin fingið gleði av einum parti av tí, ið hesir pengar fóru til.

—Øll prosjekteringin er gjørd umaftur, og fleiri av amboðunum eru farin aftur til Landsverkfrøðingin. Men ein partur er komin okkum til góðar, sigur Dávid Reinert Hansen.

Hann leggur afturat, at fyri Vágatunnilin hevur tað stóra týdning, at arbeitt verður gjørt so skjótt sum gjørligt. Landsverkfrøðingurin arbeiðir útfrá einari játtan, men P/F Vágatunnilin skal gjalda eitt lán aftur, og tí er tað sera týdningarmikið, at skaptar verða so nógvar inntøkur so tíðliga sum gjørligt.

# Virðisløn til jólaøl

**Selskab for Vestjysk Ølkultur hevur valt jólabryggj hjá Føroya Bjór til bestu jólaølina**



*Sambært Selskab for Vestjysk Ølkultur er jólabryggj so gott, at hon er best í sínum flokki.*

KJÓSAN
*Heri á Rógvi*

At drekka føroyskt jólabryggj er ikki bara nakað, ið verður gjørt í Føroyum og av føroyskum útisetum.

Tá donsk ølfeløg hava royndarsmakking hendir tað seg eisini, at onkur føroysk øl er millum løgirnar.

Í hesum førinum er tað Selskab for Vestjysk Ølkultur, sum hevur kjósað bestu jólaølirnar. Bólkað verður eftir alkoholstyrki. Jólabryggin hjá Føroya Bjór var eisini við í kappingini. Í hesum bólki – gullstyrki 5,8% – varð jólabryggj hjá Føroya kosin at vera besta ølin.

Kappingin fer fram á tann hátt, at limirnir í felagnum gera sokallaðar “blindsmakkingar” av teimum luttakandi ølunum. Serverað verður í kannum, soleiðis at limirnir í felagnum ongan møguleika hava at kenna ølina aftur.

Jólabryggin hjá Føroya Bjór endaði frammanfyri Blå X-mas hjá Thor, ið er partur av Bryggerigruppen, sum eisini umfatar Faxe, Ceres og onnur kend merki.

Á triðja plássi í kappingini kom Julbryg hjá Bryggeriet Herning. Albani og teirra Rødhætte kom á triðja plássi.

Restin av topp tíggju verður fylgt av í høvuðsheitum smærri bryggjaríum. Ølirnar hjá Tuborg og Carlsberg komu als ikki upp í part í hesum bólkinum.

Einar Waag, stjóri fyri Føroya Bjór, sigur, at teir eru fegnir um at hava vunnið kappingina, men hann ivast í, hvørt teir fara at selja meira til Danmarkar av hesi orsøk.

–Sum er ber til at fáa fatur á okkara ølum í føroyingafeløgum og ávísum vertshúsum í Danmark. Vit vóna at kunna gerast eitt meira spenandi produkt í Danmark. Àsetingarnar fyri innfluttar eru eisini broyttar í Danmark, og hetta gevur okkum ein møguleika, sigur Einar Waag.

Stjórin fyri Føroya Bjór sipar til, at donsku myndugleikarnir hava sett strangari krøv til innfluttar øl í Danmark. Tað eru sjálvar fløskurnar, sum skulu vera líkar teimum donsku. Føroysku ølirnar hava tó ongan trupulleika at klára hesi krøvini, og tí vónar Einar Waag, at teir kunnu fáa ein størri marknaðarpart í Danmark sum ein forkunnugur drykkur hjá dønum.

Lemvig Folkeblad, sum skrivaði um ølkappingina, undrast nevniliga yvir, at tað so at siga ikki ber til at fáa hendur á vinnara ølini í Danmark.

## Nýggj ølsøla á Tvøroyri



*Mynd: Savnsmynd*

*Tíðindaskriv*

Restorffs Bryggjarí fer nú at lata upp útsølu á Tvøroyri í samstarvi við T F Thomsen AS. Óla Svenn Nolsøe og Johan Mortensen eru báðir hálvir Tvøroyrarmenn og er tað teimum ein serlig gleði nú at kunna bjóða Tvøroyrarfólki og norðara parti av Suðuroynni betri framleiðslur enn tey eru von við. Frammanundan hevur Restorff útsølu í Vági.

Restorf luttekur á stóru sølustevnuni sum verður komandi vikuskifti í Vági.

Nýggja ølið VARGURIN sum var presenteraður fyri 300 fólkum í Havn seinasta fríggjadag er vorðin væl umtóktur kring alt landið.Kennarar meta hann at vera av besta bjóri sum er framleitt í Føroyum. Eisini kvinnur dáma hann sera væl.